VALGREINAR

# Framtíðin er okkara -– men stig fyri stig

**Lasse Klein**
*valevni Sjálvstýrisfloksins í Eysturoy*



Tíðin er komin, tá fleiri og fleiri føroyingar fylkjast og vilja rista dusti av politiskum ósemjum av sær. Finna saman og fremja neyðugar broytingar í ríkisrættarligu støðuni, sum flest allir Føroyingar kunnu taka undir við. Hetta er gondin, nú allir flokkar hava givið til kennar, at teir ynskja broytingar stig fyri stig, innanfyri kendar karmar.

Mong kendu seg vónsvikin, tá tað vísti seg, at bakið var bróðurleyst. Tá ið á stóð, hugsaði politiska skipanin bert um seg sjálvan, og tað sum tænti teimum best. Men úrslitið hvarv, tí eingin kendi endamálið, og peningurin var søplaður burtur, og yvirbjóðingin heldur fram inntil einki er eftir.

**Enn væl fyri**

Men tíbetur hava vit eitt ágrýtið og væl útbúgvið og upplýst fólk. Okkara land er væl útbygt við vegum, havnum og tunnlum. Skipanirnar í samfelag okkara: skúli, heilsuverk, almannaverk og samferðsla - virka nøktandi. Landið føðir seyð og neyt. Fiskur er í havinum, og undirgrundin goymir eftir øllum at døma eitt ríkidømi, sum vit nóg illa duga at droyma um.

Tíbetur hava vit frælsi at hugsa, skriva og tala, uttan mun til úr hvørjum flokki vit koma úr. Frælsi at gera støðuna upp, og hetta frælsi skal hvør einstakur gera brúk av, eisini á valinum 30. apríl.

Ov leingi hava vit latið okkum rura í svøvn. Tíðin er farin, tá vit eirindaleyst líta á, at politiski meirilutin ger alt fyri okkum. Føroyingurin er raknaður við og fer nú at taka róður í egnar hendur og krevur jarðbundnar samskipaðar loysnir.

**Eitt stig aftrat**

Lívið er eitt baks. Tað fer tað framvegis at vera. Vit føroyingar sleppa heldur ikki undan trupulleikunum, antin vit so eru innanfyri ella uttanfyri ríkisfelagsskapin, og tí spurninginum skal ein breiður politiskur meiriluti syrgja fyri.

Ein uggi er tað kortini, at vit í løtuni stevna millum boðar og sker innanfyri karmarnir í ríkisfelags-skapinum, og at tað er innanfyri hesar karmar politiska skipanin virkar út frá. Stig fyri stig at loysa trupulleikan og í samráðingum við donsku ríkisstjórnina. Tað tykist tað at verða full semja um millum allar politisku flokkarnar.

Á løgtingsvalinum kunnu vit taka eitt stig á leiðini aftrat - við at velja Sjálvstýrisflokkin.

# Frælsi er tað frælsi, vit sjálvi geva okkum

**Fríðálvur Jensen**
*valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymi*



Føroyar er millum tey lond í heiminum, sum kunnu siga seg at vera ein fræls tjóð.

www.samband.fo

# Leigusveinar Javnaðarfloksins

**Heini Holm**
*valevni Tjóðveldisfloksins í Norðstreymi*



Nú herja tey á aftur: Ingeborg, Gunleivur, Carita við Elsu Birgittu á odda ímóti sitandi samgongu í tøttum samstarvi við leislu Javnaðarfloksins. Nú er tað mentamálastýrið og mest Óla Holm tjóðveldismann tað gongur út yvir. Óli Holm hevur einki skeivt gjørt, ið tey kunnu vísa á, men ein ósemja er teimum altíð kærkomin; semjur hava ongantíð verið heilsaðar vælkomnar fyri teirra viðkomandi.

Mottoið hjá teimum tykist vera: gloym tað góða, ið hent er hesi seinastu 4 árini, ið farin eru, men hugsa bert um tað, ið ikki er nátt. Tað hevur bara gingið framá hjá øllum arbeiðarafeløgunum og fiskimannafelagnum takkað verið einari skilagóðari stýring av búskaparpolitikkinum, ið hendan samgongan hevur ført, og ikki fagfelagsformonnunum, ið alla tíðina hava roynt at lagt fót fyri og andøvt ímóti við óneygum verkføllum og ørðum tiltøkum.

Tað góða gloyma tey at nevna: t.d. at karentsdagarnir eru burtur, at nýggj dagpeningalóg fyri øll á arbeiðsmarknaðinum er samtykt, allir lønarsáttmálar eru hækkaðir munandi, at nýggj barsilskipan er sett í gildi fyri allan arbeiðsmarknaðin, at barnafrádráttirnir eru hækkaðir munandi, skatturin er lækkaður munandi, og mangt mangt annað, ið verður ov drúgt at nevna her, men tit vita: ilt eyga kann einki gott sjá. Men tíbetur eru limirnir í viðkomandi feløgum somikið at sær komnir, at teir síggja tað góða og stóra arbeiði hendan samgongan og serliga tjóveldisflokkurin hava gjørt, arbeiðaranum og fiskimanninum at frama.

Vónandi gjøgnumskoða allir fagfelagslimir teirra formenn, ið lata seg stýra av leiðslu Javnaðarfloksins og savnast um ein veruligan arbeiðara og fiskimannaflokk og velja tí Tjóðveldisflokkin.

Vit gera góðar tíðir betur. Veljið Tjóðveldisflokkin.

# Trygg gongd og ikki bundið áramál

**Heðin Zachariasen**
*valevni Fólkafloksins í Norðstreymi*



Nú er nógv at hoyra um, hvør flokkur farnu fýra árini hevur verið landi okkara at gagni. Alt gott um tað.

Okkara samfelag hevur havt sterkt viðrák tey seinastu árini. Fiskurin hevur verið nógvur og prísurin góður, alivinnan er ment nógv, rentan hin lægsta nakrantíð og nógv nýggj arbeiðspláss eru komin tey seinastu árini. Alt hetta eiga vit at fegnast um og vera takksom fyri.

Men enn meira týdning hevur tað, hvussu okkara politikarar velja at stýra. At vit føroyingar vilja klára at stýra okkara landi sjálvir, má vera rætta leiðin fram.

At føroyingar eiga fólk sum vilja og klára at stýra landi okkara, er eingin ivi um.

Men tað má gerast við varsemi. Mál okkara má vera, at vit vilja verða harrar í egnum húsi og at vit megna at lívbjarga okkum sjálvum.

Enn eru vit ikki komin á mál og tí mugu vit brúka ta tíð, sum er neyðug at fyrireika okkum í. Um føroyingar eftir eina fólkaatkvøðu ynskja tað, skulu vit vera tilreiðar at átaka okkum endaligu ábyrgdina av okkara landi í framtíðini.

Vit mugu ikki fara fram í óðum verkum. Áramálið skal tí ikki vera avgerandi, kosta hvat tað kosta vil. Nei, vit skulu stýra okkara landi soleiðis, at er neyðugt at brúka 10 ella 12 ár, so skulu vit brúka tað.

Er tað nakað, okkara politikarar eiga at gera, so er tað at tryggja fólki og eftirkomarum okkara eina trygga framtíð.

Fólkaflokkurin vil arbeiða fyri at allir borgarar í landi okkara fáa eina góða og trygga framtíð.

# Hví broyta tá leiðin er bein?

**Ingi Olsen**



Nógv hevur seinast 4 árini verið tosað um, hvør skal hava æruna fyri góðu gongdini okkara samfelag hevur verið fyri.

Serliga hava stóru anstøðuflokkarnir staðið í røð fyri at fortelja føroya fólki, at tað bert er gongdini í fiskaprísum og fiskanøgd fyri at takka - nakað teir av gomlum vana noyðast at siga. At fiskaprísir og fiskanøgd so eisini hava ávirkan, skal sjálvandi ikki afturvísast.

Nakað sum eisini verður borið fram, er at einki er hent seinastu 4 árini, við undantaki av fullveldismálinum. Einki er broytt til tað betra fyri tey gomlu, fólk fáa líka nógvan skatt sum fyrr, sjúkrahúsið liggur enn í skeljasori o.s.fr.

Tá ein so hyggur eftir, hvat er hent, ja so sæst beinan vegin, at hetta als ikki er so. Skattalættar eru framdir í fleiri førum. P/F-skatturin er farin niður, so feløg nú betur fáa lagt pening til síðis til endurnýggingar. Barnafrádrátturin er hækkaður í 2 umførum. Íløgur í samferðsluøki eru gjørdar í so stóran mun, sum ongnatíð fyrr. Pensiónirnar eru hækkaðar, og ein kundi hildið áfram. Alt batar sum raka sera breitt og sum flestu føroyingar hava merkt.

Sjáldan áður hava Føroyar verið fyri slíkari framgongd sum júst 4 seinastu árini. 4 ár við Fólkaflokkinum við róðrið. Vit hava eitt væl konsoliderað vinnulív, bæði á landi og á sjógvi. Eitt vinnulív, sum er væl fyri í alheimskappingini.

So ein kann sjálvandi seta sær spurningin. Hví fara at broyta leiðina, tá hon longu er bein?? Ja sjálvur síggi eg tað sum ein váagerð, tí ein veit, hvat ein hevur, men ikki hvat ein fær.

# Saman - sterkari

**Erikka Eltør**
*Valevni Sambandsfloksins í Norðoyggjum*

Saman við tær bjóðar Sambandsflokkurin seg til at varðveita títt persónliga frælsi.

Í Ríkisfelagsskapinum standa vit bæði størri og sterkari saman, størri og sterkari merkir fleiri møguleikar, og kenna vit ikki nógv til tað í dag, at fólk og fyritøkur leita saman í størri eindir?

Sambandsflokkurin sær tað sum ein møguleika, at tú kanst velja tær útbúgving í Danmark, og ikki sum Tjóðveldisflokkurin, sum roynir at fáa tað at ljóða sum ein straff at fara til Danmark at lesa.

Sambandsflokkurin ynskir at øllum føroyingum skal standa í boði at fáa sær útbúgving á so mongum økjum sum til ber. Sum nú er hava vit møguleikan, so hví velja ríkisfelagsskapin frá?

Hugsað um tín møguleika - X við B



VALGREINAR

# Hesaferð

**Kristian Magnussen**
*valevni og løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin*



Løgtingsvalið hesaferð verður eitt lagnuval fyri flestu okkara. Seinastu 4 árini eru Føroyar stjórnaðar eftir reseptini hjá einum lesiringi av valbjargaðum, ið líti og onki gevur sær far um gerandisdagin hjá fólki.

Hetta lovar Javnaðarflokkurin at broyta. Nú skal frælsi og sjálvsavgerðarrætturin hjá tí einstaka á dagsskrá. Tjóðskaparligt frælsi hevur onki virði um hin einstaki er ófrælsur. Javnaðarflokkurin hevur sett sær ítøkilig mál fyri tey komandi 4 árini. Mál, ið snúgva seg um korini hjá teimum eldru, familjuni, teimum brekaðu, ungdóminum og verkafólki. Hóast hinir flokkarnir borðreiða við einari útvatnaðari eftirlíkning av okkara valskrá, so torir ongin teirra at vera ítøkiligur.

Javnaðarflokkurin lovar eisini at greiða ríkisrættarliga viðurskiftini millum okkum og danir.Samband orsakað av ótta og avoldaðir fullveldisdreymar hvørt um annað, megna ikki at sameina flestu føroyingar um eina berandi loysn. Tað verður trupult hjá Fólkaflokkinum at góðtaka eina loysn, ið Sambandsflokkurin kemur við og líka so trupult hjá Sambandsflokkinum at góðtaka eitt fólkafloksuppskot. Báðir hesir flokkar kunnu hinvegin liva við einum tillagaðum javnaðaruppskotið um sjálvstýrislóg. Sostatt er Javnaðarflokkurin lykilin til eina savnandi loysn. Øll vit, ið ynskja eina berandi og varandi loysn og sum vilja frígera samfelagsorkuna til onnur økir enn til bardaga fyri ella ímóti framhaldandi fullveldiseksperimentum, mugu hesaferð fylkjast um Javnaðarflokkin.

Seinastu 4 árini er tað at verða praktiskur og varin hildi fyri gjøldur í Føroyum, hóast hesir eginleikar líka so nógv sum nakað annað, eigur lívi í okkum Við Javnaðarflokkinum verður ikki farið út á ísin, fyrr enn vissa er fingin fyri at hann ber okkum øllum, og ikki bara nøkrum fáum, ið onki tróta og sum altið syrgja fyri at bjarga sær upp á teir størstu ísflakarnar, um illa vil vð.

Hóast búskaparligur framburður hevur verið seinastu 4 árini og smávegis ábøtur framdar iinnan ávís vælferðarøki, so eru enn tung tøk at takað, sum best takast við einum sterkum Javnaðarflokki í leiðslu landsins. Serliga skal arbeiðast fyri at betra um korini hjá teimum við skerdum møguleikum, bæði ungum og gomlum. Javnaðarflokkurin hevur saman við fakfelagsrørsluni, altíð gingið á odda í stríðnum fyri at skapa fyritreytir fyri einum samfelag fyri øll og Javnaðarflokkurin hevur neyðugu styrkina og hugsjónarligu barlastina, ið tryggjar, at samfelagsmenningin verður stýrd við neyðugum fyriliti fyri tí einstaka og harvið solidaritetinum í samfelagnum.

Lesið okkara valskrá og takið okkum upp á orðið.

# Loysing ella samband

**Edva Jacobsen**
*Valevni Sambandsfloksins*



Høvuðsevnið til hetta løgtingsvalið eru viðurskiftini millum Føroyar og Danmark. Spurningurin, sum er settur, er, um vit skulu fara úr ríkisfelagsskapinum, ella um vit skulu finna eina skipan innanfyri verandi karmar.

Valið hesaferð er einfalt. Sambandsflokkurin ynskir at varðveita viðurskiftini við Dan mark og hevur einki ímóti at dagføra hesi viðurskiftini.

Tjóðveldisflokkurin harafturímóti ynskir loysing og at kvetta her og nú. Teir hava funnið eitt nýtt orð, sum eitur fullveldi, og aðrir hava latið seg tølað av hesum, men rætta orðið er loysing og loysing í óðum verki.

Sambandsflokkurin ásannar, at samlaða ríkisveitingin, blokkstuðul og annað er uml. 1,2 milliard. Um hendan upphæddin skal burtur, so mugu loysingarflokkarnir svara okkum, hvar peningurin skal koma frá.

Verandi samgonga hevur minkað blokkstuðulin við uml. 350.000 mill. Kundi hesin peningurin ikki verið nýttur til, sum áður er framført, at gjalda niður uttanlandsskuldina, at fáa nøkur fleiri røktarheimspláss fyri okkara gomlu og annars betra um tær sosialu umstøðurnar í samfelagnum.

Vit í Sambandsflokkinum ynskja at varðveita vælferðarsamfelagið á hædd við hini norðanlondini Danmark, Noreg og Svøríki, og tí er tað óðamannaverk at skerja blokkstuðulin, so sum sitandi samgonga hevur gjørt.

Vel tað trygga, vel vælferðina, vel Sambandsflokkin.

# Kvinnan – vinnan

**Elsa í Garði**
*Valevni hjá Fólkaflokkinum í Suðurstreymi*



Í valskránni hjá Fólkaflokkinum stendur: Kvinnur verða eggjaðar til at seta á stovn egin virki.

At tryggja hesum, skal átakið "Kvinnur, sum íbirtarar" halda fram.

Á veg til arbeiðis hugsi eg ofta um allar tær kvinnur sum hava egi virkið. Eg kann nevna ein heilan hóp, bert har eg dagliga gangi framvið:

Árstíðirnar – Fljóði – Skálabúðin – Mótaskálin – TMG junior – Klippistovan – Siri – Seymiskríni – Fru S – Drós – Menscendich – Beauty Line – Wrangler Shop – Barnaútgerð – Akkuleya – Mina M. Vilhelm – Hjá Ásu – Maria – Salong Viviann – Dekostovan – Bergtóra Hanusardóttir – Røktan – Hárfríðkanarhøllin.

Havi ofta hugsað, um allar hesar kvinnur seta sama spurning sum eg: Eiga MVG og punktgjøldini ikki at vera avtikin? Ella er alt tosi um íbirtarar og smávirkir bert tóm orð. Høga MVG og punktgjøldini er ein tann stórsti trupuleikin hjá smávirkjunum!!

Hvussu við tollavgreiðsluni? Manngongdirnar eru so truplar, at tað ofta kann taka fleiri dagar bara at fáa toll-avgreitt ein postpakka.

Vit í Fólkaflokkinum hava sum grundsjónarmið, at tað skal loysa seg at arbeiða. Eg yvist stórliga um tað yvirhøvur loysir seg at arbeiða hjá nógvum av teimum smáu virkjunum. Tí 50% verða goldin í skatti og 25% í MVG. Av eini ársinntøku uppá 300.000 – eru bert 120.000 eftir aftaná skatt og MVG. Og tá er leiga, ravmagn, vørukeyp, tollur, telefon og aðar útreiðslur ikki taldar við.

- Eg stuðli tiltakinum: "Kvinnur sum íbirtarar". Vald inn á ting, vil eg arbeiða fyri lægri skatti og avtøku av MVG.

# Sambandsflokkurin atkvøddi fyri at lækka blokkstuðulin

**Eyðólv Dimon**
*Valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymoy*



Nú úrslitið av nýggjastu veljarakanningini gevur Sambandsflokkinum heilar níggju tinglimur, so kann tað tykjast, sum veljarin metir, at Sambandsflokkurin er garanturin fyri, at kósin hjá Tjóðveldisflokkinum verður steðgað

Men hetta er ein sera svikafullur tryggleiki, og besta prógvið var, tá Løgtingið atkvøddi um at lækka blokkstuðulin. Støðan henda dagin var, at Sambandsflokkurin við 2. viðger, til stóra undran fyri allan tingsalin, atkvøddi fyri at lækka blokkin. Formaður Sambandsfloksins hevur seinni, saman við javnaðartinglimunum, fleiri ferðir víst á, at lækkingin av blokkinum við heili 360 mio. fór at koma okkum føroyingum aftur um brekku. Ein spyr seg sjálvan, hví atkvøður Sambandsflokkurin so fyri uppskotinum.

**Sambandsflokkurin skifti hest**

Undir allari tingviðgerðini var tað Javnaðartingfólkini, sum einsamøll royndu at tosa samgonguna frá at fremja hesa ógvusligu lækkingina, meðan Sambandsflokkurin nærum ikki luttók í orðaskiftinum. Tá so atkvøtt varð aftur við 3.viðgerð, var meirilutin fyri at lække blokkin tódnaður, tí tað hevði eydnast at yvirtala Sambandsflokkin at broyta støðu, men tað var ikki nóg mikið fyri at steðga málinum.

**Svav Sambandsflokkurin aftur í tímanum**

Spurningurin er nú, um tað var Javnaðarflokkurin, sum fekk Sambandsflokkin at skifta støðu, ella um tingfólk Sambandsfloksins enn einaferð svóvu í tímanum ?

Vit mugu gera okkum púra greitt, at skal kósin, sum Tjóðveldisflokkurin hevur stungið út í kortið, broytast, so verður tað bara gjørt við einum sterkum Javnaðarflokki. Javnaðarflokkurin er samstundis trygdin fyri, at ríkisrættarliga støðan verður avgreidd. Hetta verður ikki gjørt við at stuðla einum flokki, sum svevur í tímanum ella vinglar. Javnaðarflokkurin hevur savnandi loysnina "Sjálvstýrislógin".

# En biskop bekender sin vantro

**Peter O. K. Olofson**
*Klaksvík*



Det var en underlig oplevelse at se 'Åndernes Magt ekstra' i SvF d. 4/4-2002. 3 personer blev interviewet. Iben Tranholm, cand. theol. og journalist, undrede sig over, at der var mange præster, der ikke tog de bibelske tekster for pålydende. Pastor Ole Skjerbæk-Madsen forkyndte frimodigt frihed for fanger, herunder frihed for dem, der er besat af onde åndsmagter, mens biskop Kjeld Holm bekendte for åben skærm sin vantro. Han benægtede Satan og de onde åndsmagters eksistens. Derfor tog han også afstand fra dæmonuddrivelser.

Benægter man Satan og de onde åndsmagter eksistens, ja, så giver man dem naturligvis frit spillerum, men samtidig fratager man mennesker evangeliet. Det evangelium, der forkynder og bringer frihed til fanger. Hvad skal vi gøre med vantro biskopper? Jo, vi skal vogte fårene, sådan som også temaet for Heimamissionens årsmøde i år lyder. Dvs. vi skal give fårene den sunde og nærende kost, Guds Ord giver, og vi skal beskytte fårene bl.a. imod de biskopper, præster og prædikanter, der ikke lever og lærer i overensstemmelse med Guds Ord. Spørgsmålet er så: Er vi villige til at vogte fårene eller skal vi ofre fårene?